LANDSVERK

Løgmansskrivstovan

15. marts 2023

Sigurd L. Lamhauge
Journalnr. 23/07073-1

VIÐMERKINGAR TIL LØGTINGSLÓG UM P/F SUÐUROYARTUNNIL

Í sambandi við, at Løgmansskrivstovan hevur gjørt lógaruppskot um Løgtingslóg, ið m.a. gevur Landsverki boð um at avhenda ymiskt tilfar til P/F Suðuroyartunnilin, er Landsverk biðið um at koma við viðmerkingum til uppskotið.

Landsverk hevur víst á, at vit eru ósamd í verandi tilgongd viðv. fyrireiking av einum komandi Suðuroyartunli. Við hesum hoyringsskrivinum vilja vit gera vart við nøkur viðurskifti viðv. Suðuroyartunnlinum, sum vit meina at Løgtingið eigur at umrøða í samband við samansetingina av hesi verkætlan.

Neyðugar forkanningar mugu fyriliggja, áðrenn fíggjarleistur verður gjørdur

Fyrimunirnir við partafelagnum eru møguliga innan fíggingina, har partafelagið hevur møguleika at taka lán uttanum Fíggjarlógina. Síðani kann partafelagið taka gjald fyri koyringina í tunlinum, ið kann fíggja lánið. Loysnin hevur riggað væl, serliga fyri Vága- og Norðoyatunnilin, har umleið seinasti 1/3 av verkætlanini varð fíggjaður við lántøku. Har eru lánini afturgoldin væl innan ásettu tíð, og kostnaðurin fyri koyringina er eisini lækkaður munandi. Henda fíggjarloysnin hevur ikki eydnast eins væl fyri Eystur- og Sandoyartunnilin. Í løtuni hevur Tunnilsfelagið eitt árligt hall, sum má fíggjast á Fíggjarlógini, á næstan 50 mió. kr. ið er stuðul út yvir tær 50 mió. kr. í landið eisini letur í partapeningi. Landsverk mælir tí til at tað verður kannað nærri, áðrenn man nýtir sama fíggjarleist sum við Eystur- og Sandoyartunlunum. Í hesum sambandi kann nevnast, at Landsbankin hevur gjørt eitt notat, ið lýsir hetta nærri.

Tað almenna má seta karmarnar um verkætlanina

Veikleikarnir við einum partafelag so tíðliga í tilgongdini eru stórir, serliga í fyrireikingarpartinum, ið vit eru í í løtuni. Samansetingin av einum slíkum partafelag líkist sokallaðum PPP verkætlanum (Public-Privat-Partnership), har partafelagið er eitt sokallað privat felag, ið tó hevur almennar pengar og trygd, ið skal byggja eina verkætlan saman við tí almenna. Samansetingin av tílíkum samstørvum kann vera rættiliga ymisk, verkætlan til verkætlan. Men felags fyri tær allar er, at eigarin er í síðsta enda tað almenna. Tí er umráðandi at tað almenna stýrir tilgongdini, veit hvør ætlanin er, og harvið lýsir karmarnar fyri komandi samstarvinum.

Vit kenna ikki nakað fordømi, har byggiharrin, í hesum førum Løgting/Landsstýrismaður, biður arbeiðstakaran avgera hvat skal gerast, fyri síðani at boða byggiharranum aftur, hvat hann fer at gera og hvussu nógv tað fer at kosta. Landsverk metir tað verða sjálvsagt, at almenni byggiharrin fyrst má gera eina ætlan fyri hvat skal

gerast, áðrenn tað verður avhendað einum partafelagi/arbeiðstakara at fremja í verki. Soleiðis hugsa vit at ætlanin má lýsast innanfyri almennu skipanina, har opinleikin og gjøgnumskygnið um verkætlanina eisini kann tryggjast.

Upplýsingar mugu skjalfestast og gjøgnumskygni tryggjast
Partafeløg eru ikki fevnd av almennum innliti, har almenningurin kann fylgja við hvat hendur í felagnum. Rætturin til innlit hevur alstóran týdning, serliga í fyrireikingarpartinum har allar loysnir verða kannaðar, tí so kann almenningurin tryggja sær, at allar loysnir verða kannaðar nóg væl.

Um partafelagið skal fyrireika tunnilin, so verður tað t.d. ikki møguligt hjá fjølmiðlunum, kommunum og øðrum myndugleikum at fylgja við í arbeiðinum, og lýsa fyri Føroya fólki hvør støðan er við verkætlanini. Løgtingið kann ikki seta eitt nú § 52a fyrispurningar um verkætlanina. Felagið verður heldur ikki fevnt av eftirlitið, eitt nú frá Landsgrannskoðaranum, sjálvt um fíggjarliga støðan í felagnum kann fáa avgerandi týdning fyri fíggjarstøðu landsins.

Viðvíkjandi tí fakliga partinum í felagnum, so kunnu viðkomandi stovnar innan fakøki, eitt nú ein stovnur sum Landsverk, heldur ikki fáa innlit í arbeiðið hjá felagnum, uttan at felagið sjálvt letur upplýsingarnar til stovnin.

Landsverk metir eisini, at tað er umráðandi at lærdómurin, sum kemur við arbeiðinum at gera tunnilin kann brúkast aftur. Aðrastaðni er tað eitt av høvuðsmálunum, tá ið stórar verkætlanin verða gjørdar, at tær virka til at lyfta vitanarstøði í landinum. Við hesi partafelagsuppsetani er vandi fyri at vitan blívur burtur. Almennir stovnar hava reglar fyri skjalagoymslu, ið eitt partafelag ikki hevur, og sum tryggjar at upplýsingar kunnu finnast aftur.

Álítandi yrkisføri má tryggjast av tí almenna
Tað at felagið bert brúkar ráðgevarar, merkir eisini at felagið ikki hevur fakkøn fólk innan økið. Ráðgevar eru ein fín loysn at brúka, men tann sum stendur sum byggiharri og við ábyrgdini av arbeiðinum, eigur eisini at hava eina ávísa serkøna vitan, so man kann spyrja teir røttu spurningarnar til ráðgevarnar, sum man brúkar.

Áhugamál hjá landinum mugu raðfestast fremst
Vit hava eisini í fleiri førum sæð, at tá partafeløg eru ein løgfrøðilig eind í sjálvum sær, kann felagið enda við at taka avgerðir í ikki eru til samfelagsgagn, men bert tæna felagnum her og nú. Hetta kann í síðsta enda koma at kosta landinum, ið er eigari av felagnum, fleiri ferðir tað ið felagið sparir.

Fyrireikingarparturin er avgerandi. Tað er her tær størstu avgerðirnar fyri verkætlanina vera tiknar. Tað hevur tí alstóran týdning, at serliga hesin parturin verður gjørdur av fólki, við røttum fakligum førleikum, og sum eru óheft av nøkrum bindingum til feløg og felagsskapir, soleiðis at fyrireikingararbeiði raðfestir fyrst og fremst áhugamálini hjá landinum.

Fyrireikingar og ætlanir hjá Landsverki viðv. Suðuroyartunlinum
Í 2020-21 vóru tað játtaðar tilsamans 10 mió. kr. til at fyrireika Suðuroyartunnilin, og hetta arbeiði stóð stovnurin eisini fyri. Hetta fyrireikingararbeiði hevur gingið rættiliga væl, har allur botnurin er skrásettur, seismikkur er skotin og fleiri jarðfrøðilig kanningarhol eru boraði. Aftrat hesum, eru fleiri trygdarkanningar

gjørdar, ið lýsa avbjóðingarnar í mugu loysast viðvíkjandi trygdini í tunlinum. Harumframt er ein stór frágreiðing gjørd, ið lýsir teir ymsu møguleikarnir við tunlinum, har kostnaðurin av verkætlanini eisini er lýstur. Alt arbeiðið, sum varð framleitt hesi árini, liggur alment frammi á heimasíðuni hjá Landsverk. Í 2022 varð ikki játtað fleiri pengar til arbeiðið, og tískil steðgaði fyrireikingararbeiðið upp. Ætlanin var annars at arbeiða víðari við at loysa trygdarspurningin, ið verður høvuðsavbjóðingin í tunlinum, og sum allarhelst vil krevja nýhugsan innan tunnilsarbeiði, ikki bara í Føroyum, men eisini í heimshøpi. So var eisini ætlanin at leggja eina endaliga linju, eftir tilmælinum úr frágreiðingini hjá stovninum, ið gekk millum Sand og Sandvík, við eini loysn upp í Skúgvoy, ið vil liggja á vegnum. Ætlanin var harumframt at gera fleiri nágreiniligar jarðfrøðiligar kanningar, ið leggja seg beinleiðis at hesi linju. Hetta vildi givið Løgtinginum eina fullfíggjaða verkætlan at taka støðu til, sum tá hevði verði búgvin til at lata partafelagnum, um man ynskti tað.

Orsøkin til vali av hesi tunnilslinju var kost-nyttu kanningin, sum varð gjørd í frágreiðingini hjá Landsverki, ið vísti at yvir tíð var hetta tann bíligasta tunnilsloysnin fyri landi. Sjálv íløgan er tó nakað størri tá ið man ger tunnilin, í mun til eina loysn av Skarvanesi, ið fólkini handan partafelagið fyrr hava mælt til. Frágreiðingin vísti tó, at hesin munur varð vunnin inn aftur yvir tíð.

Talva 5 á s. 25 í frágreiðingini frá Landsverki vísir, at loysnin av Skarvanesi er umleið 270 mió. kr. bíligari í byggikostnaði, men um vit rokna nyttuna av tunlinum við, so verður loysnin av Skarvanesi umleið 40 mió. kr. dýrari (Henda talva er víst á seinastu síðu í hesum skjali). Báðir prísirnir skulu tó síggjast í mun til, at tunnilin við øllum allarhelst kemur at kosta millum 5 og 6 mia. kr. Tískil tosa vit um ein prísmun á í mesta lagi 5% av byggikostnaðinum. Tað verða helst ikki hesar síðstu 300 mió. kr. sum koma at gera, um vit gera tunnilin ella ikki, men tað eru tær fyrstu 5 mia. kr., sum koma at avgera, um tað er møguligt at gera tunnilin ella ikki.

Vandin við at lata partafelagið stýra fyrireikingarpartin er, at vit koma til eitt "point of no return", har alt ov nógvur peningur er brúktur til linjur, ið longu eru vístar at vera dýrari í longdini, at man politiskt tá sær seg noyddan til at halda áfram við hesi loysnini kortini.

Landsverk eigur at gera ætlanina, áðrenn eitt privat felag fær uppgávuna at gera verkætlanina
Vit mugu eisini viðganga, at vit standa rættiliga spyrjandi, at Landsverk er sett út á síðulinjuna á hesi verkætlan. Landsverk er ein skikkaður stovnur til at standa fyri hesum parti av arbeiðinum. Eitt nú í Norra verða førleikakrøv sett til fólkini, ið standa fyri at planleggja tunlar, og á Landsverk eru fleiri fólk sum hava hesar førleikar.

Um vit hyggja eftir royndum við fyrireiking av tunnilsarbeiði, so hava fólk hjá Landsverk seinastu 15-20 árini staðið fyri arbeiðinum at fyrireika og gera Fámjinstunnilin, Dalstunnilin, Árnafjarðartunnilin, Hvannasundstunnilin, Hvalbiartunnilin, Viðareiðistunnilin og Hovstunnilin. Harumframt er arbeiðið byrjað at fyrireika Vestmannatunnilin og Tjørnuvíkartunnilin. Afturat hesum er størsti parturin av fyrireikingunum til Sandoyartunnilin gjørdur á stovninum. Partafelagið stóð bert fyri at gera tað endaligu verkætlanina eftir linjuni, ið Landsverk longu hevði lagt, tó ikki at leggja tunnilsmunnan oman á Gomlurætt, og varð teirra arbeiði gjørt av útlendskum ráðgevum. Fyri Eysturoyartunnilin varð bulurin av fyrireikingararbeiðinum gjørdur av teimum privatu aktørunum á Skálafjørðinum, sum settu arbeiðið í gongd. Her varð linjan tó flutt nakað av verandi tunnilsfelag, men hetta arbeiðið varð eisini í høvuðsheitum gjørt av útlendskum ráðgevum.

LANDSVERK

Suðuroyartunnilin er Føroya størsta verkætlan, og eigur tí eisini at vera fyrireika á skynsaman hátt, undir leiðslu av Landsverki, ið longu hevur royndirnar við tílíkum arbeiði.

Vinaliga

Sigurd L. Lamhauge
Stjóri

LANDSVERK

TALVA 5: NETTONÚTÍÐARVIRÐI (NNV), Í MIÓ.KR, 2021 PRÍSIR

Møguleiki	1 Beinleiðis Skarvanes	2 Beinleiðis Sandur	3 Óbeinleiðis Skúgvoy	4 Toktunnil	5 Nýggj ferjuleið
Byggikostnaður:	**-4.517**	**-4.734**	**-4.906**	**-5.962**	**-809**
Verklagskostnaður	-5.638	-5.909	-6.124	-7.442	-1.023
Restvirði	1.121	1.175	1.218	1.480	214
Rakstur og viðlíkahald:	**-1.101**	**-1.051**	**-1.094**	**-1.573**	**-1.625**
Rakstur, vegakervi	-1.101	-1.051	-1.094	-	-1.625
Rakstur, jarnbreyt	-	-	-	-1.573	-
Brúkaraágóði:	**736**	**957**	**933**	**422**	**105**
Spard ferðatíð, fólk	1.740	1.897	1.895	922	478
Spard ferðatíð, farmur	22	24	24	10	6
Koyrikostnaður	-1.025	-964	-986	-510	-379
Uttanvirknaður:	**86**	**91**	**88**	**155**	**26**
Ferðsluóhapp	-54	-52	-53	-27	-19
Larmur	-70	-67	-68	-35	-24
Luftdálking	159	159	159	162	53
Umhvørvið (CO_2)	50	50	50	55	17
Aðrar avleiðingar:	**-82**	**-101**	**-109**	**-447**	**55**
Avgjaldsavleiðing	203	194	198	99	71
Skattaavlaging	-335	-358	-368	-573	-26
Økt arbeiðsmegi	51	62	61	27	10
Eyka avleiðingar:	**3.200**	**3.200**	**3.351**	**3.200**	**2.319**
Sparingar av verandi farleið	2.892	2.892	3.044	2.892	2.319
Avlýsingar av ferjum	15	15	15	15	
Betran innan elektroniska infrakervi, orka	251	251	251	251	-
Betran innan elektroniska infrakervi, internet	41	41	41	41	-
NNV	**-1.678**	**-1.638**	**-1.735**	**-4.205**	**72**
IRR	2,1%	2,2%	2,2%	1,0%	3,5%
Netto nytta pr. almenna krónu*	-	-	-	-	1,65

Mynd 1: Talva úr frágreiðingini hjá Landsverki um ymsar loysnir fyri Suðuroyartunnilin. Niðast (NNV) sæst, at besta loysnin fyri landið út frá eini kost-nyttu kanning, er loysnin millum Sand og Sandvík, ið Landsverk eisini mælir til.